gult cyan magenta svart

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Ítróttur
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Skáli nærkast toppinum

3. deild: At vágbingar eru væl fyri sæst eisini aftur í úrslitunum hjá næstbesta liðnum, sum er við í kappingini um heiðursmerkini

Kappingin um gull og silvur krónurnar sær út til at gerast tættari, enn tað leingi vóru ábendingar um. Skálamenn, sum hava lagt av at rógva kapp, sayna seg nú um fótbóltin. Úrslitini hava verið góð tær seinastu ferðirnar, og um tað ikki fer at órógva ov nógv, tá teir nú aftur fara at fyrireika seg til eitt nýtt kappingarár í hondbólti, so kundi tað væl farið at laga seg soleiðis, at teir í AB fara at fáa kapping um plássið, sum ber beinleiðis uppflyting til næstbestu deildina við sær.

Munurin er ikki serliga stórur millum tey fremstu. AB og Skáli hittast á Argjum 13. august. Úrslitið av tí dystinum fer at verða rættuliga avgerandi fyri, hvussu tað fer at laga seg.

Í botninum gongur tað bara skeiva vegin hjá klaksvíkingum, sum enn eina ferð taptu syndarliga stórt. Um gongdin tær seinastu ferðirnar undan summarfrítíðini fer at halda fram, so skal KÍ bara spæla tvær ferðir eftir summarfrítíðina, áðrenn eitt hundrað mál eru farin ígjøgnum hjá teimum.

Tað stendur eisini illa til hjá ÍF. Hjá teimum er talan um næstbesta liðið. Teir hava bara vunnið tvær ferðir í teimum fyrstu tíggju dystunum.

Annars er tað stórur munur á, at tað gongur betur at fáa dómaraseðlarnar til vega nú, enn tað gjørdi inntil fyri nøkrum heilt fáum árum síðani. Í so máta tykist tað rigga væl í so at siga øllum feløgunum.

FS Vágar–B68

Tá fyrra umfarið var hálvrunnið, hevði Jákup Olsen longu skorað tvær ferðir fyri gestirnar, og alt bendi á, at teir skuldu fara við øllum stigunum úr Vágm. Men so varð ein av toftamonnunum útvístur, og í 2. hálvleiki var tað akkurát so, at B68 fekk javnleik og harvið eitt stig.

Jógvan Hendrik Samuelsen ella Hegga er heima í summarfrí, og hann skoraði eitt av málunum hjá FSV. Kanska hann verður at síggja á besta liðnum í august. Olaf Højgaard hevur tey seinnu árini verið evnaríkur miðvallari á besta B68 liðnum. Hann spælir ikki á høgum støði longur, tí hann er sjómaður. Í frítíðini er hann góður fongur hjá 3. deildarliðnum, og hann skoraði eitt mál hesa ferð. Janus Thomsen, sum onkuntíð hevur verið í 1. deild, javnaði til 5-5 í evstu løtu.

ÍF–B36

Kanska var miðalaldurin hjá fuglfirðingunum bara tað hálva av tí, sum hann var hjá gestunum úr B36, sum tað hesa ferð eydnaðist at manna lið hjá. Í 1. hálvleiki dugdu ungu fuglfirðinganrir ikki at gera nyttu av, at teir ivaleyst orkaðu væl meira enn mótstøðumenninir. Ferðin var lág, og møguleikarnir vóru fáir.

Bara ein lítil løta var farin av seinna umfarinum, tá royndu B36 menninir settu tingini upp á pláss. Regin Arge setti hol á, tá hann var fyrstur á returbólti eftir roynd frá Sigfríða Clementsen. Jákup Mørk hevði møguleika at økja til 2-0, men hann spældi uppaftur leystari Sigfríða Clementsen. Jákup hevði eisini næstsíðsta fótin á, tá Tummas Eli Hansen økti til 3-0. Skotið hjá arbeiðssama ítróttarblaðmanninum fór í stólpan og út til fyrrverandi landsliðsmann.

Tummas Eli var í álopinum hjá B36, og tað var hann, sum spældi álopsfelagan Sigfríða Clementsen leysan, so hesin kundi økja til 4-1. Ólavur Ellingsgaard, sum var einasti veteranurin á ÍF liðnum, minkaði um munin til 3-1, og Viggo Johannesen pyntaði um til 2-4.

VB–TB

Jóansøkudysturin varð fingin frá hondini longu fríggjakvøldið. Tað var ikki serliga nógvur futtur í, men lítil ivi var um, hvør átti tað betra liðið.

Einki mál kom undan steðginum. í 2. hálvleiki stútaði Marner Richard heimaliðið framum, og fyrrverandi TB venjarin, Egil Steintórsson, staðfesti heimasigurin. Veteranurin tykist skora í so at siga hvørjum dysti.

Vágbingar eru við í kappingini um bronsukrónurnar, og tvørámenn eru nødgir við, at teir higartil væl og virðiliga hava megnað at hildið niðurflytingarvandanum langt frá sær.

Skáli–KÍ

Í fyrsta umfarinum vóru skálamenn í Klaksvík. Fyrsta umfarið í 3. deild varð spælt sama dag sum fyrsta umfarið í 1. deild. Fyrsta umfarið í 2. deild varð spælt eina viku seinni. KÍ vann í fyrsta umfarinum móti Skála. Teir á Skála hildu seg vera óhepnar ta ferðina, tí teir høvdu næstbestu klaksvíkingarnar sum mótstøðumenn.

Síðani tá hevur tað so spakuliga gingið rætta vegin hjá Skála. Ta seinnu tíðina hevur tað hilnast meira enn illa hjá KÍ. Klaksvíkingar fingu ein mann útvístan í 1. hálvleiki, men tá var munurin longu so mikið stórur, at tað ikki hevði stórvegis týdning fyri gongdina.

JH

Úrslit
10. umfar – 25. juni
FS Vágar–B68 5–5 (0–2)
0–1: Jákup Olsen 14.
0–2: Jákup Olsen 24.
1–2: Jónsvein Olsen 48.
2–2: Jógvan H. Samuelsen 53.
3–2: sjálvmál 55.
3–3: Jákup Olsen 57
3–4: Olaf Højgaard 61
4–4: Hilmar Hansen 70.
5–4: Eyðfinn Fjalsbak 72.
5–5: Janus Thomsen 90.
Reytt kort: Arnfinn Olsen, B68, 36.

ÍF–B36 2–4 (0–0)
0–1: Regin Arge
0–2: Sigfríður Clementsen
0–3: Tummas Eli Hansen
1–3: Ólavur Ellingsgaard
1–4: Sigfríður Clementsen
2–4: Viggo Johannesen

VB–TB 2–0 (0–0)
Dysturin varð leiktur 23/6
1–0: Marner Richardt
2–0: Egill Steintórsson

AB–B71 2-4
Varð leiktur 21/6 og umrøddur í farnu viku

Skála–KÍ 14–3 (5–0)
1–0: Pauli Hansen 4.
2–0: Pauli Hansen 20.
3–0: Marius Joensen 25.
4–0: Jón Rasmussen 29.
5–0: Pauli Hansen 40.
6–0: Niels Thomsen 53.
7–0: Annfinn Joensen 59.
8–0: Hans Chr. Djurhuus 61.
9–0: Bent Djurhuus 67.
10–0: Jørmund Joensen 69.
10–1: Christian Andreasen 70.
11–1: Pauli Hansen 72.
12–1: Jørmund Joensen 74.
13–1: Jørmund Joensen 81.
14–1: Hans Chr. Djurhuus 83.
14–2: Bárður Andreassen 86.
14–3: Bogi Isaksen 89.
Reytt kort: Sámal Henriksen 33.
(gult og beinleiðis reytt)

Máltindurin

Signar Johannesen	AB	11
Kristoffur Vidtfeldt	B71	11
Oddbjørn Joensen	AB	9
Pauli Hansen	Skáli	9
Egill Steintórsson	VB	9
Aksel Højgaard	B68	8
Kaj Roest	TB	8
Jákup Olsen	B68	6
Kári í Láabø	VB	6
Svend Poulsen	AB	6
Regin Arge	B36	5
Hallur Christiansen	TB	5
Eyðun Svalbard	TB	5

Støðan, 3. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B36	10	8	-	0	-	2	31	8	23	24
2	AB	10	7	-	0	-	3	46	22	24	21
3	Skála	10	6	-	1	-	3	38	21	17	19
4	VB	10	6	-	0	-	4	25	31	-6	18
5	B71	10	5	-	0	-	5	36	28	8	15
6	B68	10	3	-	3	-	4	31	26	5	12
7	TB	10	3	-	2	-	5	34	34	0	11
8	FS Vágar	10	3	-	2	-	5	28	30	-2	11
9	KÍ	10	3	-	0	-	7	25	76	-51	9
10	ÍF	10	2	-	0	-	8	21	39	-18	6

adidas

gult cyan magenta svart

Styrkja seg

Steypafinalan: Báðir finaluluttakararnir í kvinnufinaluni fáa styrk uttan ífrá

JÁKUP MØRK

Seinnu árini er tað vorðið alt meira vanligt, at lið í bestu deildini hjá monnum styrkja seg við leikarum uttan ífra í longri ella styttri tíðarskeið.

KÍ roynir nýggjar leiðir

Hjá kvinnunum hevur henda gongd tó ikki verið so vanlig. Sjálvandi hava liðini fingið styrk av og á, men hetta hevur aloftast verið við leikarum, sum vanliga búgva uttanlands, men sum kanska eru heima í summarfrí ella líknandi.

Nú verður tó øðrvísi hesum viðvíkjandi, tí til steypafinaluna hjá kvinnum, sum verður leikt sunnudagin, hevur KÍ fingið sær styrk av flatlondum.

Talan er um Lisbeth Hansen, sum vanliga er liðfelagið við Helgu Ellingsgaard og Eyðvør úr Dímun í Hillerød.

Lisbeth er 25 ára gomul, og hevur sína dagligu gongd í álopinum, har hon leikti 157 dystir fyri Rødovre, áðrenn hon í fjør gjøri av at flyta til Hillerød. Eisini hevur hon leikt tvær ferðir á danska U-21 landsliðnum, so tað er ikki hvør sum helst, sum KÍ hevur fingið hendanvegin. Enn hevur hon tó ikki vunnið sær fastan sess í Hillerød álopinum, men hon hevur tó alla tíðina verið við í fyrstaliðshópinum.

Tað eru tvíburðarnir á KÍ liðnum, Rannvá og Ragna Andreasen, sum hava fingið alt í rættlag hesum viðvíkjandi. Ragna greiðir frá, at tær kenna Lisbeth frá tíðini, sum tær vóru liðfelagar í Rødovre.

Víðari sigur Ragna, at hetta hevur ligið í luftini leingi, men at tað ikki varð fyrr ein í farnu viku, at alt kom í rættlag.

Annars heldur KÍ leikarin, at tær halda hetta vera eina sera spennandi roynd, og hon væntar eisini, at hetta fer at styrkja um KÍ liðið. – HB hevur jú fleiri ferðir fingið Helgu og Eyðvør heim til slíkar dystir, so tí hildu vit eisini, at vit kundu roynt hetta. Nú hava vit tríggjar ferð verið í finaluni, uttan at tað hevur eydnast at vinna, so nú skal tað vera. sigur Ragna at enda.

Eyðvør skal styrkja HB-liðið

Lisbeth T. Hansen kemur til Føroya fríggjadagin, og í sama flogfari verður eisini Eyðvør úr Dímun, sum skal styrkja um HB liðið í finaludystinum.

Eyðvør hevur hetta kappingarárið roynt seg í Hillerød, har hon sostatt hevur verið liðfelagi hjá Lisbeth. Hon kemur nú heim í summarfrí, og væntandi fer hon ikki heim aftur fyrr enn miðskeiðis í august mánaði, so umframt sjálva steypafinaluna, fer hon væntandi at styrkja um HB liðið í einar tveir ella tríggjar landskappingardystir eftir summarfrítíðina.

Spurd um hon ætlaði sær heim at vinna steypafinaluna svaraði hon, at tað ætlaði hon sjálvandi. Hon legði tó dent á, at hon roknar við einum sera truplum dysti, og hevði mest sum hug at gera KÍ til favorittar.

– Sum eg havi skilt á lagnum, so mugu vit vera Liljuna av Fløtum Jespersen, Gunn Müller og Vivian Torleifsson fyri uttan, so har eru í øllum førum tríggir týðandi leikarar, sum ikki verða við.

Hvussu fer at avtorna, tá tær báðar Eyðvør og Lisbeth, sum vanliga eru liðfelagar, skulu royna seg móti hvørjum øðrum, er sjálvandi ilt at gita. Tað tykist tó sannlíkt, at tað júst kann verða onnur teirra, sum kemur at hava avgerandi orðið at siga sunnudagin.

Eyðvør ur Dímun er onnur av Hillerød leikarunum, sum kemur av flatlondum at spæla steypafinalu

DU HAR S´GU IKKE FORSTAND PÅ FODBOLD...!

Niðanfyristandandi grein, sum er ein hugleiðing um tær fótbóltshendingar, sum í hesum døgum fara fram, hava vit fingið sendandi. Greinin hevur áður verið prentað í GÍ-skránni, men tolir helst at síggja dagsins ljós einaferð enn

Sama dag, sum GÍ og HB skulu royna seg ´í finaludystinum um Løgmassteypið, verður EM-finalan leikt á leikvøllinum í Rotterdam, og hetta kann geva orsøk til afturhvarv

TORBJØRN JACOBSEN

Rotterdam. Hugsi tað var í 84. Silgdu á gomlu leiðini hjá Skipafelagnum, ímillum Havnina, Grimsby & hendan stórstaðin í skipahøpi. Kom at kenna ein av hesum water-klerkunum serliga væl. Molukkurnar í Kyrrahavinum eru fyrrverandi hálendskt hjáland, og haðani var hann slektaður. Vit vóru javnir í árum.

Fótbóltur var hansara subreligión, og hóast íðin Feyenoord viðhaldsmaður, so hevði landsmaðurin Simon Tahamata størstu stjørnuna í hansara fótbóltsknokki.

Fara Føroyar at troytta meg nakrantíð, - so flyti eg til Hálands at búgva. Eitt deiligt land og eitt serliga fryntligt og blíðligt fólkaslag.

Farvæl til Cruyff

Hepnið hevði tað við sær, at árliga steypafinalan skuldi spælast ímeðan vit lógu inni á Maas ánni hetta várið. Feyenoord vs. Fortuna Sittard. Livandi legendan Johan Cruyff skuldi spæla sín seinasta dyst. Hesaferð fyri Rotterdam-liðið. Hesin Rudolf Nurejev í fótbóltsheiminum skuldi hetta kvøldi enda sítt aktiva fótbóltslív á De Kuip Stadion, og hálvthundrað túsund hálendingar fóru at fagna og takka honum fyri, at hann gjørdi Háland til eitt stórveldi í fótbóltsheiminum.

Okkara trupulleiki var, at øll atgongumerkini vóru seld. Orðaði hetta við vinmannin frá Molukkunum. Hann vildi gera tað sum stóð í hansara makt. Sær sjálvum hevði hann syrgt fyri í ivaleysa góðari tíð. Kvøldið fyri steypafinaluna fór hann á veiðuferð á svarta marknaðinum, og har hevði hann fingið okkum fatur á atgongumerkjum, soleiðis at øll manningin kundi síggja persónligu finaluna hjá kanska heimsins besta spælara nakrantíð. Einar 500-600 krónur mundu tær kosta pr. stk., - men tað bilti einki, heldur hetta upplivilsið enn deyðu krónurnar á eini turrari bankabók.

Útselt

Vit báðir molukkanarin og eg fingu okkum kanska ein genevara og eina Heinekenøl hetta kvøldið, dubbaðu okkum til hetta stóra slagið, sum lá ein sólarring burturi.

Árla morgunin eftir fingu vit, óvæntað, siglingarboð frá Skipafelagnum. Og nú vóru góð ráð dýr. Høvdu kanska keypt køttin í sekkinum. Molukkanarin kom við boðunum, niðurbrotin, so niðurundirkomin okkara vegna, at tað tóktist sum ein flóðalda í Kyrrahavinum hevði skolað heimlandið hansara av heimskortinum. Vit norðbúgvar eru kanska meiri sinniligir, so eg royndi at sissa hann so frægt sum tilbar. Saman royndu vit síðani at finna onkrar útvegir.

Søguligur dystur

Ótrúligt sum man kann hugsa rationelt í kreppustøðum. Flestu føroyingar kenna Lamain. Hinderikus Lamain og pápi mín kendust heilt væl og harvið var hann mær ikki heilt ókendur heldur. Fryntligi hálendingurin er giftur inní og er ein av oddvitunum í Skipafelagnum Føroyar. Ringdi til Keypmannahavnar og greiddi honum frá støðuni. Tað var leyst og liðugt beinanvegin. Bara vit løgdu til havs so títt og knapt dysturin var liðugur, skuldu vit onki hoyra aftur um hesa hendingina.

Soleiðis kann ein vinarligur maður geva einum garða av sjómonnum eina upplíving sum teir ongantíð gloyma aftur í lívinum. Vinmaðurin var í sínum sjeynda himni.

Soleiðis gongur tað tá ið hvørt lagar seg eftir øðrum. Jóhann Cruyff og hin seinri so kendi Ruud Gullit, á høgra veingi, vunnu finaluna. Kanska var hetta onkursvegna ein søguligur krossvegur, harið Cruyff læt spælið frá sær til hina seinri so stóru Surinam-stjørnuna Ruud Gullit.

50.000 hálendingar róptu seg hásar hetta kvøldið. Ein ófatulig kensla sum eingin kann greiða frá. Nú blása fótbóltsvindarnir aftur um Evropu, og um 3 vikur, fyrsta sunnudagin í juli mánaða, verða evropameistararnir kosnir á sama leikvøllinum sum megastjørnan Cruyff læt frá eitt slag av fótbólti, totalfótbóltin, sum allur heimurin síðani hevur verið bergtikin av.

Gævi at eg kundi verið hjástaddur á De Kuip Leikvøllinum hin 2. Juli, tá ið eftirkomarar Cruyff´s, van der Sar, Stam, de Boer, Seedorf, Davids, Overmars, Winter, Kluivert, Bergkamp og aðrir vónandi kunna lyfta evropasteypinum upp ímóti skýggjunum eftir ein totalan sigur á heimavølli.

Her heima

Kanska havi eg nú verið ið so internationalur. Turbulensurin er øgiligur fyri tíðina og fótbóltsvindarnir eru globalir. Røkka heilt til Føroya og longri. Vit sum hava traðkað okkara barnaskógvar í túninum úti í Grógv vóna sjálvandi at Løgmanssteypurin verður fluttur til Gøtu, eftir at hann hevur otað seg upp ímóti skýggjunum úr lógvum Magna Jarnskor, á hinum nú so famøsa landsleikvøllinum, - Tórsvølli. Hetta verður ein sjaldsamur sunnudagur, harið besta liðið í Evropu verður kosið samstundis sum skurðarnir gera innrás í Gundadali og yvirtaka leiklutin hjá grágæsnum, - í hvussu er fyri ein dag. Tað hevur kanska verið ið so tunnligt í landskappingini higartil, men sum ein skyldmaður úti í Grógv plagdi at taka til: "Lad ikke modet falde." Seti tykkum nú fyri at tit eisini fáa steypin frá bryggjaranum í Klaksvík, úti á Svangaskarði 2´ Mikkjalsmessudag, tá ið fótbóltsfjøllini umsíður eru gingin. Persónliga vóni eg tó at 5´ deildarliðið hjá NSÍ gerst føroyameistari, nú tá ið eg sjálvur havi snørað mær gaggurnar til eitt spennandi kappingarár. Illar tungur vilja vera við, at tað eru politiskar orsøkir til, at eg eri komin á liðið, men líkamikið, tá ið vit vunnu 19-2 á FRAM á niðara vølli í høvuðsstaðnum, kom eg á málskjúttaralistan. Tað sigur kanska ikki so nógv. Tað velst um eyga sum sær.

Tað visti hann einki um

Tom Søndergaard er eitt tað stórsta talentið sum Danmørkin hevur fostrað. Spældi við B93 og danska landsliðnum. Seinri spældi hann saman við Jóhann Cruyff í Ajax. Í 60-árunum var hann saman við B93 í Føroyum og spældi. Ímóti Býliðnum á Ólavsvøku. Dómarin var føroyingur. Og einaferð dømdi hann brotsspark til Býliðið. Tom fer út ímóti síðulinjuni, og tá letur í honum: "Det var s´gu ikke straffe(!)". Skamt harífrá stóð Jákup hjá Emil hjá GøtuJákup, ella HavnaJákup sum vit kallaðu hann úti á Glyvrum. Orðknappur sum hann var, svarðaði hann Tom Søndergaard soleiðis: "Áh, hold du din kæft, du har s´gu ikke forstand på fodbold(!)"

Tað verður verðandi ein ævigur sannleiki, at teir bestu fótbóltsspælararnir altíð standa framvið síðulinjuni. Spyr bara Martin Juul, Oddfríð, Jallin, 2 X Atla, Henry, Andreas, Kaj, Jørgen Evald o.a…